ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

24. juni 2022
Mál: 22/11589
Tygara Skriv:
Viðgjørt: Barbara Álvsdóttir Thomsen

Nr. 52/211-2021

Svar upp á § 52 a fyrispurning nr. 52/211-2021 frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í almannamálum Sólvit E. Nolsø, um frítíðartilboð til børn við serligum tørvi

Fyrispurningurin ljóðar soleiðis:

1. Hvussu nógv børn í skúlaaldri frá 3. flokki standa á bíðilista til frítíðartilboð eftir skúlatíð?
2. Hvussu er bíðilistin býttur yvir landið?
3. Hvussu nógv fleiri børn hava tørv á frítíðartilboði til komandi skúlaár?
4. Er nøkur ítøkilig ætlan um at útvega hesum børnum frítíðartilboð frá komandi skúlaári?

Svar:

Til nr. 1 og 2

Sambært upplýsingum frá Almannaverkinum stóðu í alt 31 børn á bíðilista til eitt frítíðartilboð tann 31. mai 2022.

Av hesum 31 børnunum hava fýra fingið bjóðað frítíðartilboð nú eftir summarfrítíðina.

Bíðilistin er býttur soleiðis yvir landið: í Suðurstreymoy standa 13 børn á bíðilista, í Norðurstreymoy 4 børn, í Vágum 3 børn, í Norðoyggjum 1 barn og í Eysturoynni 10 børn.

Til nr. 3

Í løtuni viðger Almannaverkið 10 umsóknir um frítíðartilboð til børn. Aftrat hesum hevur Almannaverkið samband við uml. 3-4 børn, sum kunnu hugsast at hava tørv á frítíðartilboði eftir summarfrítíðina. Royndirnar hjá Almannaverkinum vísa harnæst, at Almannaverkið eftir skúlabyrjan eisini fær tvær til tríggjar umsóknir um frítíðartilboð innan hendan málbólk.

Eydnast ikki at útvega fleiri pláss til frítíðartilboð næstu tíðina koma sostatt uml. 40 børn at standa á bíðilista til frítíðartilboð, tá komið er út í september.

Til nr. 4

Arbeitt verður støðugt við at útvega hóskandi høli og starvsfólk fyri at gera tað møguligt at veita børnunum á bíðilista neyðuga tænastu.

Almannaverkið er av teirri fatan, at nógv børn við serligum tørvi høvdu havt størri gagn av einum heildartilboði heldur enn at hava fleiri ymisk tilboð.

Ítøkiliga kann nevnast, at avtala nýliga er gjørd við Mentamálaráðið og Skúlan á Trøðni um, at nøkur av teimum børnunum, sum ganga á hesum serskúlatilboðnum og fara í 3. flokk eftir summarfrítíðina, kunnu fáa frítíðartilboðið veitt á skúlanum eftir skúlatíð. Í løtuni fevnir avtalan bert um 2 børn.

Somuleiðis verður arbeitt við at gera seravtalur við tær kommunur, sum hava frítíðartilboð til børn frá 3. flokki. Endamálið er, at tey børn, sum hóast serliga tørvin kunnu megna at ganga í kommunala frítíðartilboðnum við eyka normering, fáa hóskandi tilboð. Almannaverkið hevur eina slíka seravtalu og arbeiðir í løtuni við at fáa eina slíka avtalu afturat við aðra kommunu.

Almannamálaráðið 24. juni 2022

Sólvit E. Nolsø
landsstýrismaður